ÍTRÓTTARÁRIÐ

Juni:

Kongurin vitjaði

Talvkongurin, Gary Kasparov kemur til Føroya, og uttan iva er hetta størsta navn, sum nakran tíð hevur vitjað um okkara leiðir. Her býður Torbjørn Jacobsen honum at vera vælkomin

Meistaraheitið hjá FCK og Toda Jónsson var mest sum køvt, tá ein av heimsins gitnastu ítróttamonnum vitjaði í Føroyum í juni mánaði

1. juni
Ivasamt er, um Christian Høgni Jacobsen verður klárur til landsdystin móti Sveis, men annars tykjast allir leikarar vera tøkir til uppgávuna.

2. juni
Hóast teir eru favorittar, so er Stephané Henchoz hjá Sveis sannførdur um, at talan verður um ein truplan dysti móti Føroyum.

6. juni
Johan Danilsen, sum annars hevur vart málið hjá StÍF, fer komandi árið at spæla við Kyndli.
Føroyar tapa tepurt fyri Sveis, tá Alexander Frei í 81. minutti skjýtur einasta málið í dystinum á Svangaskarði.

7. juni
HSF boðar frá, at komandi árið verða eingir altjóða dystir á skránni á A-landsliðnum. Fíggjarliga takið er ov stórt, til at hetta kann gerast á hvørjum ári.ð.

8. juni
Føroyska landsliðið tykist tungt, tá teir spæla ímóti Jugoslavia, og úrslitið er ein lemjandi 6-0 ósigur. Eftir dystin heldur Allan Simonsen, at avrikið móti Sveis framvegis sat í beinunum.

9. juni
Ivasamt er, um Todi Jónsson verður tøkur til stórdystin móti Brøndby. Vøddaskaðin í lærinum argar framvegis.
Talvkongurin, Gary Kasparov kemur til Føroya, og uttan iva er hetta størsta navn, sum nakran tíð hevur vitjað um okkara leiðir.

12. juni
Hóast hann bergtekur øll á føroyaferð síni, so verður Kasparov tó við undirlutan, tá 17 ára gamli Hans Kristian Simonsen úr Kollafirði er hin einasti, sum fær kongin at leggja kongin í simultankappingi, sum Kasparov var partur av.
Todi Jónsson er danskur meistari. Hóast hann ikki er á vøllinum, tá FCK tryggjar sær gullið við at vinna á Brøndby, so verður Todi mettur sum ein hin týdningarmesti leikarin á liðnum. Eisini sambært gitna enska venjaranum, Roy Hodgson. Samstundis er greitt, at Herfølge er liðugt í donsku superliguni.
Í heimligu kappingini heldur GÍ áfram við sigursgongd sínari.

13. juni
Eftir norðoystevnuna er kapp-róðarfepurin av álvara farin at herja í Klaksvík. Nevið Reyða, Fíopan Fagra og Páll Fangi vinna øll sínar róðrar.
Í Danmark er hátíðarhald á Rådhuspladsen, har leikararnir hjá FCK verða fagnaðir.

14. juni
Todi Jónsson greiðir í drúgvari samrøðu frá, hví júst árið í ár gjørdist so gott hjá FCK.

15. juni
FCK staðfestir meistaraheitið, tá teir eisini vinna seinasta dystin á árinum á útivølli móti OB.
TV3 sjónvarpsverturin, Jakob Kjledbjerg, greiðir í samrøðu frá, hvussu yrkisleiðin hevur flutt seg úr fótbóltinum til sjónvarpið.

16. juni
Julian Johnsson hevur gjørt sáttmála við Hull í fjórðbestu ensku deildini. Sáttmálin tekur við 4. juli.
Meðan flestu feløgini gera klárt til enn eitt umfar í landskappingini, rigga toftamenn grasvøllin á Svangaskarði til. Belgiska Lokeren er mótstøðuliðið í Inter-Toto kappingini.

19. juni
B68 javnar í fyrra hálvleiki til 2-2, men at enda fer luftin úr heimaliðnum, og Lokeren vinnur Inter-Toto dystin á Svangaskarði 4-2.
B36 tykist hava fingið ferð á, og vinna 5-0 á KÍ, men GÍ er framvegis á odda eftir sjeynda sigurin á rað. Hesaferð móti NSÍ. Annars er rok í HB, har Uni Arge ikki var á liðnum, tá teir spældu útidyst móti EB/Streymi.
Jákup Mikkelsen loysir frá posabandinum, og sigur seg vera illa viðfarnan í Herfølge, har hann nú gevst at spæla.

20. juni
Ein uppgerð tykist vera ávegis í kreppurakta KÍ. Starvsnevndin og fótbóltsnevndin eru ósamd um fleiri viðurskifti, og úrslitið er, at fótbóltsnevndin leggur arbeiðið niður.

21. juni
Í stórari samrøðu sigur Johan Byrial Hansen, at hóast hann er uppvaksin í Danmark, so kennir hann seg sum føroying, og at hann er errin av at vera á føroyska landsliðnum.

22. juni
ÍSB fær 80.000 kr. frá stuðlafelagnu,
Í Gøtu hava teir lagt seinastu hond á nýggja graslíkisvøllin, og nú verður farið í gongd við at leggja vøll á í Klaksvík og í Runavík.
Venjarin hjá donsku meistarunum, Roy Hodgson, ætlar sær til Udinese at gearst venjari.
KÍ og ÍF skulu spæla steypafinaluna hjá unglingum. Dysturin skal spælast á Tórsvølli.

23. juni
Stóri dysturin um vikuskiftið verður í Havn, har grannarnir bresta saman. Spenningurin gerst ikki minni av, at Uni Arge nú aftur hevur játtað at spæla við HB.
Bjarni Wardum hevur gjørt av, at hann fer at spæla við H71 komandi kappingarárið.

26. juni
Í seinnu royndini eydnast B68 at fáa stig í Inter-Toto cup, tá utidysturin móti Lokerern endar við málleysum javnleiki.
B36 vinnur slagið um høvuðsstaðin, og minkar munin upp til GÍ í tvey stig, men gøtumenn hava ein dyst til góðar.
Manslandsliðið í flogbólti til komandi Oyggjaleikir er nú útvikið.
Jákup Mikkelsen hevur enn ikki gjørt av, hvar fótbóltsframtíð hansara liggur.

27. juni
Mest sum allir vinnararnir eru teir somu sum á norðoystevnu, tá jóansøkan er á skránni. Bert í 6-mannafórum fyri menn er nýggjur vinnari at síggja.
Martin Venned úr Klaksvík heldur, at talið av FM-róðrum er alt ov lítið.
Í 2. deild í fótbólti er HB nú á odda. Skála er einasta liðið í oddinum, sum kann flyta upp.

28. juni
Tað er nú greitt, at FCK missir bæði venjara og málverja. Roy Hodgson fer til Udinese og Thomas Myhre er ikki sinnaður at halda fram í felagnum.

29. juni
Hjalgrím Elttør er stóra hetjan, tá hann skjýtur fimm mál í steypafinaluni hjá unglingu, KÍ vinnur dystin 7-2.
GÍ vinnur útsetta dystin móti B68, og hevur framvegis fult stigatal eftir átta umfør.

30. juni
Fótbóltsskúlin hjá FSF er hús-villur í høvuðsstaðnum, har hvørki HB ella B36 hava umstøður at leggja hús til, ta vikuskiftið sum skúlin er á skránni.

ÍTRÓTTARÁRIÐ

Juli:

Fimleikurin bjargaði Oyggjaleikunum

Føroyar vinna fleiri gullmerki enn nakran tíð áður á Oyggjaleikunum, men nógv tann største partin av hesum syrgir fimleikurin fyri

Helgi Winther Olsen varð hin stóri sigursharrin á Oyl, og einsamallur stóð hann fyri heili sjey av føroysku gullmerkjunum

3. juli
GÍ vinnur eisini níggjunda dystin á rað, og seta harvið met í bestu deildini. Ongan tíð hevur eitt lið vunnið níggju teir fyrstu dystirnar í einum kappingarárið. B36 vinnur á meistarunum úr VB, og tykist vera einasta liðið, sum kann hótta gøtumenn.
Í aðru deild vinnur Skála oddasessin aftur, men sera javnt er. Tvey stig frá nummar eitt niður TB á sætta plássinum.
John Arni Nielsen gerst triðbestur í sterkari danskari talvkapping.

4. juli
Fasti starturin dumpar í Fuglafirði, har tað tók yvir tríggjar tímar at avgreiða FM-róðurin á varmakeldu.
Millum óvæntaðu úrslitini eru sigrarnir hjá Sílinum í 5-mannafórum hjá dreingjum og Kvívikingi hjá 8-mannafórunum.

5. juli
Kurt Mørkøre kemur nú aftur til KÍ. Fyrsti dysturin hjá landsliðsmanninum fyri barndómsfelagið verður steypafinalan á ólavsøku.
Helga Nordendal hevur framvegis skaða, og er ivasom til Oyl.

6. juli
Farið verður avstað til Oyggjaleikirnar á Isle of Man, og í Sosialinum er stórt innlegg um leikirnar.

10. juli
Oyggjaleikirnir eru settir, og sum ein partur av hesum fáa føroysku fótbóltskvinnurnar høvið at heilsa upp á Prins Edvard, áðrenn tær fara undir fyrsta dystin. Hesin endar við føroyskum stórsigri, 11-0.
KÍ kvinnurnar skulu til Finnlands at spæla Europa-Cup í fótbólti.
GÍ heldur fram við sigursrøðini, nú farið verður undir seinnu kappingarhálvu, og KÍ verður sent til hús við stórtapi.
Finnur Hansson, sum áður hevur verið føroyameistari við Neistanum, fer komandi veturin at spæla hondbólt við H71.
Bæði kvinnur og menn vinna sínar dystir í flogbólti á Oyl.
Ingibjørg Poulsen verður nummar fýra í kúluvarpi, meðan Heini Hátún er í hálvfinaluni í 200 metrum, og Magni Mouritsen kemur í finaluna á 800 metrum.
Í fimleiki eru kvinnurnar 0,1 stig frá at fáa bronsu í liðkappingini.

11. juli
Føroysku fimleikararnir eru í øðini. Hóast teir sýndu nógv besta avrikið í liðkappingini, so verður talan tó bert um silvur aftan fyri liðið av Isle of Man. Venjarin rópar hetta fyri snýt.
Flogbólturin vinnur aftur tveir tryggar sigrar.
Ási Mikkelsen gerst nummar fýra í longdarlopi. Tað sama ger Rógvi Johansen í einkultstartinum á súkklu. Heini Hátún, Sunnuvá Bjarnastein og Magni Mouritsen kappast øll, men vinna ikki heiðursmerki.
Svimjingin fær tvey silvurmerki, meðan fótbóltskvinnurnar buldra víðari. Hesa ferð við 5-0 á Ynos Mon.
Í Hvalvík verður róð kapp, og Dreingirnir á Tjaldri, genturarn á Fípuni Føgru, kvinnurnar á Páll Fanga, teir á Nevinum Reyða og Havnarbátinum hava øll mest sum tryggjað sær gullið.
FCK hevur gjørt avtalu við Magnus Kihlstedt um, at hesin skal verja málið hjá meistarunum komandi árið.

12. juli
Jákup Mikkelsen tosar við norska felagið, Molde, og møguleiki tykist vera fyri einum sáttmála. Samstundis venur Christian Høgni Jacobsen við Esbjerg, har hann vónar at fáa sátmála.
Heri Ziska vinnur bronsu í sleggjuvarpi, meðan Erland Poulsen somuleiðis vinnur bronsu í badminton.
Í svimjing fremur føroyska stafettin eitt mistak, og hetta kostar gullið á 4x50 frí. Framman undan hevur Asbjørn Hansen tó tryggjað Føroyum fyrsta gullmerkið á leikunum.
Bæði kvinnur og menn vinna aftur í flogbólti, men kvinnurnar hava óvæntaðar trupulleikar ímóti Guernsey.
So gjørdu fimleikararnir bart. Í einstaklingakappingini vinna føroysku menninir alt, og millum annað fær Helgi Winther Olsen ikki færri enn fýra gullmerki.
Í bogaskjóting tykist føroyska liðið at stevna beint móti gullmerkjunum.

13. juli
Føroyska stafettin kiksar aftur, tá teir verða kolldømir í 4x100 metra blandað. Eivind Eysturoy og Asbjørn Hansen vinna tó silvur í einstaklingakappingum.
Í borðtennis vinna Kjartan Eli Hentze og Petur Niclasen bronsu í tvímansleiki, og Kjartan Eli fær í minsta lagi bronsu í einmansleiki, eftir at hann hevur vunnið seg til hálvfinalurnar.
Flogbóltsmenninir fáa bank frá Saaremaa, og gerast nummar tvey í sínum bólki. Súkklararnir, Bogi Kristiansen opg Rógvi Johansen, enda beint uttan fyri heiðursmerkjarøðina.
VB fær málleysan javnleik, tá teir á Tórsvølli spæla móti hvítarussiska Slavia Mozyr.
Jákup Mikkelsen hevur gjørt sáttmála við Molde, og skal í dyst um hálva aðru viku.

14. juli
Ási Mikkelsen heldur, at skulu Føroyar vinna meira á Oyggjaleikunum, eigur eitt miðvíst elituarbeiði at fara fram heima í Føroyum.
Heri Ziska vinur bronsu í klingruvarpið, og tað sama ger føroyska stafettin á 4x100 metrum frí.
Bæði fót- og flogbóltskvinnurnar vinna gull í tveimum sera spennandi finalum. Í flogbólti gerst úrslitið i3-2, meðan kvinnurnar við 10 leikarum vinna eftir longda leiktíð.

17. juli
IM John Rødgaard vinnur FM í snartalvi.
Helgi Winther Olsen fekk seinasta dagin á Oyl trý heiðursmerki afturat.
Føroyska súkkluliðið fær kortini eitt heiðursmerki, tá Bogi Kristiansen vinnur bronsu í býarkoyringini.
Compound liðið í bogaskjóting vinnur greitt gullmerkini, og í revurve fær liðið bronsu.

18. juli
Á Vestantevnu verða fleiri føroyameistarar funnir. Fípan Fagra, Páll Fangi, Nevið Reyða og Havnarbáturin eru somikið langt fremst, at tey verða ikki tikin.
Í Klaksvík er fagnaðurin ovurstórur, tá tær tríggjar FM-manningarnar koma heim.

19. juli
Helgi Winther Olsen, sum varð álvarsliga skaddur stutt undan Oyl, men sum kortini gjørdist stóri sigursharrin, heldur at føroyskur fimleikur kann mennast nógv meira, um umstøðurnar verða betraðar.

20. juli
Statoil kring Føroyar er byrjað, og í sterka feltinum verður tað danin, Anders Michaelsen, sum vinnur prologin.

21. juli
Øssur Hansen hevur gjørt avtalu við B93. Toftamaðurin skal spæla við danska felagnum hetta til heystar.
Í Statoil kring Føroyar hevur Jannik Petersen lagt seg á odda, men rok stendst av, at summir súkklarar tykjast súkklað sum eitt lið, og endin er, at Rógvi Johansen og fleiri danskir súkklarar trekkja seg úr kappingini.

24. juli
Bogi Kristiansen vinnur Statoil kring Føroyar, men rokið um Rógva Johansen og hinar Shellsúkklararnar oyðilggur dámin av hesum.
Jákup Mikkelsen stendur seg sera væl, tá hann debuterar ímóti Rosenborg.
Hjalgrím Elttør royndarvenur í Bolton, har hann droymir um at gera fótbóltin til sítt livibreyð.

25. juli
Trætan um Statoil kring Føroyar heldur fram, og tað stendur orð ímóti orði millum partarnar í málinum.

26. juli
HB-liðskiparin, Kristina Eyðbjørnsdóttir, skiftir undan steypafinaluni til KÍ.

27. juli
Ólavsøkan stendur fyri framman, og bæði innan kapppróður og steypafótbólt verður nógv gjørt burturúr.

31. juli
B36 vinnur steypafinaluna hjá monnum, meðan HB vinnur eftir brotssparkskapping móti KÍ hjá kvinnunum. Regnið fær tó sín part av umrøðuni, tí neyvan er nøkur steypafinala leikt undir slíkum umstøðum.
Í kapppróðrinum verða Strálan og Tjaldri seinastu FM-vinnararnir.